her numu fleiri føroyskir dreingir sær skiparaútbúgving. Og so gjørdi Jacob og seinni fór hann eisini á motorpassaraskúla og sigldi hann fleiri ár við "Cementu". Og sum landsstýrismaðurin nevndi so hevur hetta uttan iva verið ein spennandi tíð, tá ið skipini fingu motor, og seglini einans tændu sum hjálp afturat motorinum.

## Ja-ligur

Somuleiðis var Runavíkar Býráð umboðað av komandi borgarstjóranum Hans Jákup Lamhauge, ið helt eina talu um elsta borgaran í kommununi. Har hann m.a. orðaði seg soleiðis lívið hjá Jacob:

"Tann, ið fær loyvi at liva so leingi sum tygum Jacob koma at uppliva ymiskar tíðir. Tað hava verið uppgangs- og niðurgangstíðir. Tygum hava uppliva tvey heimskríggj, og tygum uppliva so nógvar og stórar samfelagsbroytingar, sum man næstan bert kann droyma um... Meðan nógv eldri fólk ofta eru ivasom fyri tí nýggja sum kemur fram, so hava tygum altíð verið meira ja-ligur, sum tey nú á døgum siga."

## Væl hýrdur 100 árs føðselarur

Hóast tey hundrað árini, so sat Jacob væl hýrdur við til alt borðhaldið, ið varaði úti við tríggjar tímar, og fylgdi væl við í tí teir ymisku gestirnir høvdu at bera fram á fagnaðardegnum. So hvørt røðurnar vóru lidnar takkaði hann fyri. Eftir eina sera væl eydnaða hugnaløtu og eftir at gestirnir høvdu persónliga heilsað uppá høvuðspersónin hendan dagin, var hendan løtan komin at enda.



*Komandi borgarstjórin Hans Jákup Lamhauge segði nøkur væl vald orð um 100 ára føðingardagsbarnið*



*Glyvra Streingjakór sang til borðhaldið*



*Prestur Meinhard Bjartalíð, Hans Jákup Lamhauge, Jónsvein Knudsen og Eyðálvur Knudsen*



*100 ár á muni. Til staðar var eisini eitt oldurabbabarn hjá Jacobi, hesin eitur Regin Fríði. Her saman við ommu síni*



*Ein av mongu langabbabørnunum saman við Jacobi*





*Úr USA vóru serlig M&M-góðgæti í alskyns litum bílagt til høvið. Hesi vóru á borðinum. Har var skrivað á hvørt bommið "Jacob is 100"*